## Nú vil Klose av landinum

HM-toppskjúttin Miroslav Klose, sum spælir fyri týska felagið Werder Bremen, ætlar sær nú út um Týskland at royna síni fótbóltevni. Klose hevur sáttmála við Werder Bremen fram til næsta summar, og nú verður rokna við, at Klose fer at skifta felag.

- Bayern Munchen hevur eitt gott lið, men um eg skal skifta frá Werder Bremen, skal tað verða til eitt útlendskt stórfelag sum tildømis Barcelona ella Real Madrid, sigur 28 ára gamli Kolse við týskar fjølmiðlar.

Klose hevur spælt 61 landskappingardystir fyri Werder Bremen, og hann hevur gjørt 42 mál í hesum dystum.

## Sviar leiga flogfar til Linderoth

Miðvallarspælarin Tobias Linderoth fór leygardagin úr svensku landsliðsleguni og fór heim til konu sína, sum er sett at eiga týsdagin. Men alt verður gjørt fyri at fáa Linderoth við til dystin ímóti Íslandi mikukvøldið, og nú hevur svenska fótbóltssambandið leiga eitt flogfar, sum skal flúgva Linderoth til Íslands. Um tað hendir, at konan skal eiga, verður Linderoth flogin beinleiðis heimaftur til Svøríkis eftir ongari tíð.

# Landsliðið stríddi seg aftur á

**Føroyska landsliðið breyt upp um armar, stríddist sum í gomlum døgum, og tað hevði við sær frægasta úrslitið í hesi undankappingini. Litaviska sigursmálið í evstu løtu sveið hjá føroyska liðnum, men dysturin gav ábendingar um eina hugaliga landsliðsframtíð**

FØROYAR-LITAVA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Landsliðsvenjarin Jógvan Martin Olsen hevði rættiliga ryst posan undan dystinum ímóti Litava leygardagin. Eftir tvey stórtap – eyðmýkjandi og beisk – skuldi landsliðið á føtur aftur. Trýst var á venjaranum og á spælarunum undan dystinum, og neyðugt var við einum heilt øðrum avriki enn í undanfarnu dystum ímóti Georgia og Skotlandi.

Samanborið við seinasta dystin vóru nýggir spælarar á 9 plássum á liðum, tveir debutantar vórðu sendir á vøllin frá fyrsta bríksli, og tríggjar aðrir spælarar høvdu spælt fimm landsdystir ella færri undan hesum dystinum.

Miðverjan varð nýggj, bakkarnir nýggir og sentrali miðvøllurin nýggjur. Landsliðsvenjarin tók ein kjans, og tað spældi heilt væl av. Spælararnir stríddust sum í gomlum døgum, avrikið var nógv tað besta í hesi undankappingini, og tað var líka við, at liðið fekk eitt stig burtur úr dystinum.

Føroyska liðið hevur havt stórar trupulleikar við verjuspælinum í teimum fyrstu dystunum í hesi EM-undankappingini. Verjuspælararnir hava ikki veri nóg avgjørdir, teir hava dekkað ósannførandi framman fyri málið, og mótstøðuliðini hava havt alt ov lætt við at gera mál – eisini móti einum málmanni, sum ikki hevur spælt upp til sítt vanliga sera høga støði.

Leygardagin var alt øðrvísi. Ein spildurnýggj verja vardi við góðari hjálp frá røskum miðvallarum sera væl, og Jákup Mikkelsen var at kenna aftur í sínum leikluti sum tryggur aftasti skansi. Vagnur Mohr Mortensen og Fróði Benjaminsen stóðu seg rættiliga væl í miðverjuni. Teir komu mest sum ikki í renniduellir við litavisku spælararnir, teir vunnu nógvar nærdystir, blokeraður fleiri ferðir fyri skotum og lótu mest sum ongantíð litavar standa leysar í brotsteignum.

Atli Danielsen og Marni Djurhuus stóðu seg væl á bakkplássunum. Hesaferð vóru tveir góðir verjuspælarar settir á bakkin, og tað styrkti um verjupartin. Verjan fekk eisini góða hjálp frá arbeiðssomum miðvallarum, sum altíð leitaðu skjótt aftur í verjustøðu og tóku eitt stórt tak í verjupartinum.



### Vardu trygt

Føroyska liðið hevði gott tamarhald á litaviska liðnum í fyrra hálvleiki. Litavar fingu ongantíð sítt spæl at koyra við teirri ferð, sum er neyðug fyri at lata føroysku verjuna upp, og royndirnar, sum teir høvdu á málið, komu mest sum allar úti frá.

Fimm langskot vóru í fyrra hálvleiki, men einki av teimum gav Jákupi Mikkelsen stórvegis trupulleikar. Í tveimum øðrum støðum komu litvar til skot í brotsteignum, men eingin veruligur upplagdur málmøguleiki var.

Føroyar royndu at søkja at við kontraálopum, og tað var um reppið, at okkurt kundi komið burtur úr hesum. Símun Samuelsen, sum spældi ein góðan dyst, sendi eftir ein hálvan tíma eina góða avlevering aftur um litavisku verjuna, men Christian Høgni Jacobsen slapp akkurát ikki fram at. Í einari aðrari støðu komu Símun, Jákup á Borg og Christian Høgni í eina yvirtalsstøðu ímóti litavisku verjuni, men Jákup varð takklaður í avgerandi løtuni.

Christian Høgni gav fleiri dømi um, at hann kundi renna kapp við miðverjuna hjá Litava, og tá ið Mikkjal Thomasen sendi hann avstað nakað fyri hálvleikssteðgin, var vandi á ferð í litavisku verjuni.

### Stórt trýst í seinna hálvleiki

Litavar løgdu meira fyri í seinna hálvleiki. Tað var uttan iva tosað hart og týðiligt í litaviska skiftingarrúminum í hálvleikssteðginum, tí spælararnir vóru ídnir og virknir frá byrjan í seinna hálvleiki. Litava leyp á við alt meira fólk, og innskiftingin av 10'aranum Mindaugas Kalonas hevði eisini positiva ávirkan á litaviska álopsspælið.

Størri trýst var lagt í síðunum, fleiri spælarar søktu inn í brotsteigin, og stundum hevði Litava bert tveir spælarar í verjustøðu. Tað gjørdist eisini heitari í føroyska brotsteignum, og tað var nú, at føroysku spælaranir veruliga vístu, at teir vildu stríðast fyri

## Føroyar-Litava 0-1 (0-0)

**EM undankappingardystur á Tórsvølli í Havn leygardagin 8. oktober 2006 kl. 16.00**

**Dómarakvartett úr Írlandi:** Anthony Buttimer, Barry McDonnell, David Wogan og Paul Tuite.
**Áskoðarar:** 1982
**0-1:** Andrius Skerla, 88.
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen, 45/-94, liðformaður, B36 – Atli Danielsen, 16/0, KÍ, Vagnur Mohr Mortensen, 2/0, HB, Fróði Benjaminsen, 39/2, B36, Marni Djurhuus, 1/0, EB/Streymur – Jákup á Borg, 46/2, HB, Pauli G. Hansen, 4/0, Skála (Arnbjørn Hansen, 1/0, EB/Streymur, 89.), Mikkjal Thomasen, 1/0, B36, Símun Samuelsen, 6/1, Keflavík (Jónhard Frederiksberg, 12/0, Skála, 73.) – Rógvi Jacobsen, 39/6, HB (Kári Nielsen, 5/0, HB, 81.), Christian Høgni Jacobsen, 30/2,
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Meinhardt Joensen, 0/0, KÍ, Julian Johnsson, 63/4, B68, Herbert í Lon Jacobsen, 0/0, B36, Janus Joensen, 3/0, HB,
**Gult kort:** Mikkjal Thomasen, Pauli G. Hansen, Jákup Mikkelsen,
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen
**Litava:** Zydrunas Karcemarkas, Dinamo Moskva – Gediminas Paulauskas, FK Ekranas, Tomas Zvirgzdauskas, Halmstad, Andrius Skarla, Tom Tomks, Marius Stankevicius, Brescia – Deividas Cesnauskis, Hearts, Darius Miceika, Metalurgs, Mantas Savenas, FK Ekranas (Mindaugas Kalonas, Metalurgs, 46.), Saulius Mikoliunas, Hearts (Vitalijus Kavaliauskas, FK Ekranas, 62.) – Robertas Poskus, Dinamo Moskva (Ricardas Beniusis, Kaunas, 70.), Tomas Danilevicius, liðformaður, LivornoVenjari: Algimantas Liubinskas